# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Áhugaverd prestaorð

Hvalvíksprestur hevur í blaðnum sera áhugavert lesarabræv, ið meira ella minni er framhald av prædiku, ið hann hevur hildið seinasta sunnudag. Í lesarabrævinum rósar hann G! festivalinum og vísir á, hvussu sømiliga alt fer fram eins væl og hann vísir á, at festivalurin tónlistaliga er í fremstu røð í Europa. Her munnu øll vera samd við presti, og allir føroyingar fegnast um, at hetta frálíka tiltak nú er við at gerast víðagitið og er vorið til kult. Fyrireikararnir eiga mikið rós uppiborið fyri sera professionelt avrik, tó at tað altíð vil vera okkurt, sum kundi verið betri.

Men prestur fer longur enn at rósa G! Festivalinum. Hann mælir til, at vit nú endurskoða okkara rúsdrekkalóggávu, soleiðis at tað fer at bera til at keypa vín og øl í vanligum matvøruhandlum. Hann sigur sum satt er, at føroyskur ungdómur er so búgvin og væl skikkaður, at ein eigur at líta ungdóminum til at umsita teirra egna lív. Verandi skipan virkar sum reint formyndarí og ger fólkið ómyndugt. Vit kunnu ikki annað enn geva hvalvíkspresi rætt. Hetta, at ein skal í Rúsuna fyri at fáa hendur á teimum veikaru sløgunum er í roynd veru ein landaskomm. Hetta er eitt dømi um, at løgting og landsstýri, sum eiga núgaldandi rúsdrekkalóggávu, ikki hava álit á tí fólki, sum tey eru sett at stýra!

Landsins myndgukeikar eiga tí nú at fara undir at endurskoða rúsdrekkalóggávuna við tí fyri eyga at liberalisera tann partin, sum snýr seg um ey veikaru sløgini. Føroyingar eru ikki verri fyri at umsita sítt forrúk enn onur fólkasløg. Í flestu ikki muslimskum londum ber til at keypa øl og vín í vanligum handlum. Eingin orsøk er til at óttast fyri, at ungdómurin kemur sær í vanda av eini slíkari skipan. Her hevur prestur rætt. Ein ungdómur, sum skikkar sær so væl kann saktans umsita eina meira liberala skipan. Eingin skipan varðar í ævir, og einhvør skipan hevur gott av at verða endurmett. Nú er tíðin sambært hvalvíkspresti komin at endurskoða rúsdrekaskipanina og í hesum, um ikki í øðrum, eru vit samd við presti.

**Sosialurin**

## Góði Sonni Jacobsen

**ANDREAS POULSEN**
Bøur

Í bók tíni Sørvágur og Sørvingar sigur tú "Hetta nevni eg bara, ikki tí, um onkur vil kalla Vatnið okkurt annað, so má tað verða teirra søk."

Hetta meinar tú ikki, tí hevur nakar váðað sær at skriva Leitisvatn, so hevur tú lagt í bløðini móti viðkomandi.

Tú spyr, hví miðvingar ikki skrivaðu Leitisvatn. Tað var sjálvandi tí, at umsøkninar um veg o.a. skuldi til umsitingina. Teir søgdu Sørvágsvatn. Tað er tað, sum eg vísti á í grein míni. Umsitingin segði Sørvágsvatn, men á fólkamunni kallaðist tað Leitisvatn.

Tú skrivar. " Annars mundu miðvingar og sandavágsmenn havt størri ávirkan á donsku embætismennirnar enn sørvingar. Teir høvdu prest, sýslumann og løgmann hinumegin vatn. Í Sørvági var ongin embætismaður." Tú sigur annars í bók tíni frá einum sørvingi sum er "vurderingsmann", "landfogedens tjener ", "fulltrúi " hjá fútanum, seinni sýslumaður fyri Streymoy við sæti í Havn. So heilt sørir hava sørvingar ikki verði um hetta mundið.

Sagnirnar hjá Dr. J. Jacobsen leggur tú einki í, men ævintýrini hjá honum hevur tú tikið við í bókum tínum.

Tú skrivar "Hvør, ið er komin við navninum (Leitisvatn) kundi annars verði áhugavert at vitað." Hetta sigur tú, hóast tú í fleiri greinum hevur sagt, at Mikkjal á Ryggi er komin við tí.

Í Vágum eru fýra vøtn. Hviltkinnavatn, Vatnsdalsvatn, Fjallavatn og Leitisvatn. Vøtnini eru nevnd eftir lendi har tey eru. At geva vatninum eitt bygdanavn haldi eg ikki hevur verið tað upprunaliga, eisini tí at Sørvágur liggur tvær ferðir so langt frá vatninum sum Miðvágur, og strandalendi er væl størri miðvágsmegin.

Til seinast. Eg meini, at upprunaliga navnið er Leitisvartn.

## G-festival og alkoholens forbandelser!



**MOGENS TILSTED CHRISTENSEN**
Sognepræst på Nordstrømø

I en tid, hvor der afholdes mange sommerfestivals i Europa, er der tid til at se på, hvad konsekvenserne kan være, når disse såkaldte festivals løber af stabelen. Roskilde-festivalen i Danmark, der i år blev afholdt i øsende regnvejr i begyndelsen af juli måned , rangerer som den ypperste rockfestival i Europa, forstå det, hvem der kan.

Rockfestivalen er ikke noget godt eksempel på for Færøernes ungdom, der netop lige har afholdt sit eget store og vellykkede G-festival. Tillykke med dette arrangement, der på ingen måde ligner Roskilde druk- og hor-festival.

G-festivalen rangerer højt på den europæiske liste af vellykkede arrangementer målt i kvalitet, faktisk på en anden plads. Den burde være en førsteplads som nr. 1. Den afholdte festival var et præ-eksemple for den verdslige ungdom, og dem skal der nu engang også være noget for og være plads til. Politiet beretter om minimale problemer og fredfyldt forløb.

Men ungdom, festival og alkohol er en farlig blanding, og den må man behandle med ansvarlighed.

Dvs. at man som voksne og forældre må undervise sine børn i alkoholens og stoffernes skadelige virkninger.

Allerede for to tusinde år siden vidste man, at alkohol medfører forbandelser og har dårlige bivirkninger. Paulus skriver i brevet til menigheden i Efesus kap. 5, vers 18: "Drik jer ikke berusede i vin, det fører til udskejelser, men lad jer fylde af Ånden".

Hvad er udskejelser? Lad os nævne nogle få eksempler fra hverdagen: Slagsmål på værtshuse, i hjemmene og andre steder, familieødelæggelser, pædofili og lignende ulovligheder, overgreb af forskellige slags, trafikforsyndelser med voldsomme skader, fyringer på arbejdspladsen, svigt af ansvar o.s.v.

Der er ingen grund til at tage alkohol i forsvar.

Men når det så er sagt, så er tiden måske ved at være inde, hvor man på Færøerne i år 2007 bør se på, om et overformynderi i form af rusdrik-butikker har nogen som helst berettigelse i et oplyst, veluddannet og moderne Færøerne på vej mod 2015?

Alle, som vil have alkohol, kan købe det i lufthavne, i flyet, på færgerne, i Danmark og mange andre steder til det halve af den overpris, der skal betales i monopolbutikkerne.

Hvorfor skal færinger være underlagt et overformynderi på den måde.

Den færøske befolkning er ikke en flok børnehavebørn, der skal overvåges og kontrolleres. Færøerne er i dag er et velfungerende og oplyst samfund bestående af selvstændigt tænkende mennesker.

Lad det færøske folk selv bestemme, om de vil købe vin og alkoholiske drikke i supermarkederne, lad dem gøre deres egne erfaringer og lære heraf. Alkoholforbud skaber flere alkoholskader.

Med oplysning i skoler og i konfirmandstuerne og lignende steder kan man undervise ungdommen i ansvarlighed og ædruelighedens fordele.

Jeg synes det er bedst at vise det gode eksempel og vise frihedens ansvarlighed gennem fri handel og fri undervisning.

Med venlig hilsen

www.teologen.dk

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.